gult cyan magenta svart

Ári› - sæ› í mentuntarligum ljósi

Tórbjørn Jacobsen

Ørkymlandi stø›a, at skula velja og vraka burturúr eini stórari rúgvu av mentunarupplivingum. Og so er ta› tann veruleiki, at kanska gekst betri at røkja littereru & musikalsku akkumulatorarnar, tá i› tú sjálvur ráddi yvir fríaktunum, enn nú, tá i› tú fer fram inni á Glyvrum í l‡singini, og sjáldan er aftur vi› hús fyrenn um mi›náttarleiti›. Onkursvegna rennur meiri út enn ta› rennur inn í høvdi›. Kanska tí at ein ikki enn hevur vant seg vi› hetta landkrabbalívi›, hari› fleiri atlit skula takast enn man er vanur vi›. Hetta seinasta nosi›, hari› ein fluga í denn grad gjørdist ein uppreklamera›ur fílur, vóru kanska abstinensir frá mínum gamla og komandi arbei›slívi. Men um ikki anna› kom burturúr tí, so fingu vit ígjøgnum útvarpi› sta›fest illtankan um, at Fólkaflokkurin politiskt og hugsjónarliga er ímóti at hátí›arhalda einasta dagin, sum arbei›arafjøldin, einsamøll, eigur í árinum, og eisini, at hann er ímóti at avtaka danska Grundlógardagin sum frídag í føroyskum skúlum. Ná, men máli› er nú reist. Og ta› kunna bara ver›a batar, i› liggja í havsbrúnni.

Besta bókin? Ja, ta› valdast bøkur. Kom fyri stuttum framá eina skaldsøgu ni›ri í gamla bókhandli. ”Cuba Libre” hjá franska rithøvundinum Reginé Deforges. Ein av teimum stóru í okkara tí›. Ein fín l‡sing av cubansku kollveltingini. Kann bara mæla øllum til at lesa hana. Á søguliga ella rættari si›søguliga økinum eri eg ómetaliga imponera›ur av bókini ”Hin føroyski ró›arbáturin” hjá Andrasi Mortensen. Makan til vælaverk skal man leita leingi eftir. Prógvar, at í yngra skaranum av skrivandi fólki liggur eitt øgiligt potentiali, sum farast skal væl um. Harmist um at eg ikki var heima tá i› hon var› almannakunngjørd. Fekk hana sendandi frá høvundinum, og ta› eri eg sera takksamur fyri.

Besta fløgan? Hetta er kanska torførasti spurningurin. Ov nógv at velja í-millum. Men, sum tú veist, so dámar mær serliga væl Bubba Morthens. Fekk hesa uppsamlingina frá honum, ”Søgur 1990 – 2000”, tá i› vit hittust í Reykjavík í heyst, og tá i› hetta er hæddin í hansara tónleikaskei›i, velji eg hesa, ímillum fleiri, sum liggja tætt undir bor›i.

Besti filmur? Havi líti› skil á hesum økinum. Durvi pr. definitión tá i› einir 5 minuttir eru farnir av einum filmi. Veit ikki hví. Hetta má bara ver›a eitt gamalt skot. Ein eldri filmur frá Vietnam krígnum ”The dear hunter” dámdi mær somiki› væl, at eg hugdi at honum fleiri fer›ir. Høvdu hann á bandi umbor›. Sjáldan er sálarligi terrorin mótvegis tí einstaka, í bá›um pørtum, í einum kríggi, so væl l‡stur som her. Myndin av hesum amerikanska unglinginum, vassa›ur út í narkohelviti, hari› hann situr og spælir russiska roulet fyri fíggjarliga at halda rúsinum gangandi inn í ævinleikan, er ein so sterk mynd, at hon fer ikki úr høvdinum aftur í bræ›i. Og so var hetta bara eitt ideologiskt strí›, hari› dey›ans keypmenn vóru teir einastu i› fingu naka› burturúr. Kanska var ta› ”eisini” ætlanin?

Besti sjónleikur? Krypilin úr Inishman. Eitt vælaverk av Grímu. Gav stórar vónir um eina bjarta framtí› í føroyskum sjónleikalívi. Nú gle›i eg meg bara til at síggja frumframførsluna av hesum n‡ggja sjónleikinum hjá Jóanesi Nielsen einafer› í vár. Her eru vit veruliga á einum vegamóti. Ta› blí›kar fyri huga›um monnum og kvinnum má sigast.

Besta frams‡ning? Ólavsvøkuframs‡ningin.

Besta tiltak? Ta› er ómetaliga ilt at siga. Ta› kundu veri› so nógv. Men eg haldi vi› Dimmalætting tá i› teir siga, at hetta Bjørn Afzelius kvøldi› í Nor›urlandahúsinum var til UG. Ikki tí at vit bá›ir høvdu eina lítla rollu í tiltakinum, men tí at tónleikurin var í topp. Og atmosferan vi›. Eitt anna› tiltak, sum eg var ikki sørt hugtikin av, var eitt konsertkvøld í losjuni í Gøtu, hari› Ivory spældu saman vi› hesum fantastiska saxofonistinum, sum vitja›i oyggjarnar í summar. Húsi› er líti›, men onkursvegna gerst ta› púra elektriskt, tá i› stórir listamenn fylla ta› vi› sínum gávum. Tú minnist kanska tá i› Bjørn Eidsvaag fyri nøkrum árum sí›ani hev›i eina konsert har. Gu› hann ná›i meg fyri eitt upplivilisi. Stemningurin var so komprimera›ur og høgur, at hann kann ikki beskrivast, hann mátti upplivast.

Besta mentunarupplíving? Ja, ta› mundi vera tá i› eg sjálvur var› settur at forvalta mentanina frá politiskari sí›u. Hetta var sjálvandi skemt. Eg veit ikki rættiliga. Men at hitta og tosa vi› 3 so stórar listamenn sum Ingálv av Reyni, Bubba Morthens & Mikhael Wiehe hevur havt stóran t‡›ning fyri meg. Onkursvegna hava teir veri› ein partur av tær, hesir merkiligu menninir, vi› teimum ógreiniligu, Gu›agivnu gávunum. Og so standa teir har, sum øll onnur, hamar av kjøti og bló›i. Áh, hvat er ta› ikki vælsigna›, at menniskju ikki ver›a skapt, í dusinum, bunta›i saman á einum flowandi samlibandi. Munurin ger lívi› vert at liva!

vi› frændakvø›u

tobbi

Lágt er hjá mentamálará›harranum í Føroya minsta skúla. Til høgru Óla Jákup í Dímun.

Besta mentunarupplivingin ár 2000:

Krypilin úr Inishmaan

Augusta Mikkelsen

Sum stjørnur á himmalinum seta upplivingarnar seg. Jú longri tú hyggur, fleiri stjørnur sært tú. Ta› er tí trupult at taka› eina uppliving framum a›ra. Hetta var ta›, i› kom mær til hugs, tá eg skuldi velja bestu mentunarupplivingina í ár. Tó vil eg nevna nakrar stjørnur, innan eg komi til hina bestu: Aftaná 20 ár aftur at síggja filmin Blikktrumman eftir bókini hjá Günter Grass; fimleikafagna›urin í Nor›urlandahúsinum; bøkurnar hjá Jens Paula Heinesen, ”Á fer› inn í eina óendaliga søgu” og beint nú upplivi eg Írlandi í 30’unum saman vi› Frank McCourt og bókini ”Angela’s Ashes”.

Fyri meg er ein gó› mentunaruppliving, sama um ta› er ein bók, filmur, sjónleikur ella okkurt anna›, ein uppliving har kenslur mínar ver›a raktar og eg gloymi meg burtur.

Ta› sum tó stendur mær sterkast í minni er sjónleikurin ”Krypilin úr Inishmaan” ein kenslunemandi uppliving. Eg kendi meg settan eini 30 ár aftur í tí›ina og dugi væl at ímynda mær, at sjónleikurin var bygdur á lívi› í eini føroyskari bygd um ta› mundi. Persónarnir vóru allir kendir og eg kom at hugsa› um fólk, eg næstan hev›i gloymt høvdu veri› til. Eg vóni tó ikki at hetta er ein søga í kundi veri› skriva um eina føroyska bygd ídag. Útfer›arlongsulin munnu flestu føroyingar kenna, og so hetta at ta› er okkurt uttanífrá komandi í skal bjarga okkara lívsinnihaldi. Allur sjónleikurin var ein sonn sansauppliving, til tí›ir føldi eg sjóroki› í andlitinum, luktin av tara og olju og so hesin heilt serligi lukturin, sum er í fjør›uni aftaná brimgang.

At ver›a til sjónleik á so høgum stø›i var heilt avgjørt ein stór uppliving. At síggja sjónleikin saman vi› allari familjuni gevur eina felags mynd, i› vit altí› fara at hava hjá okkum og vit kunnu tosa› um somu persónar og ímynda okkum teir. Nú hostin hevur veri› so ringur, kunnu vit jú lættliga ímynda okkum Halta-Billy.

Hetta var ein framúr gjøgnumførdur sjónleikur – ein vælvirkandi eind. Ein gó› uppliving at minnast aftur á, tá hugsa› ver›ur um mentan í árinum 2000.

Augusta

August Mikkelsen, skrivari í Javnstø›isnevndini

Ta› besta í 2000

Helga Hjörvar

Millum ta› besta eg havi uppliva› á føroyska mentunarpallinum í ár, havi eg hug at nevna eina rø› av upplivingum.

Frumframførslan hjá íslendska symfoniorkestrinum av fyrstu føroysku symfoniini hjá Sunleifi Rasmussen í Nor›urlandahúsinum.

Hetta var ein stórfingin hending, sum ta› var sera spennandi at fáa loyvi til at uppliva.

Av einstøkum sjónleikaraavrikum kunnu leiklutirnir hjá Katarinu Nolsøe í s‡ningini hjá Grímu "Moder syvstjerne" á Meiarínum ver›a nevndir. Hon hevur bæ›i leiklutirnar sum Antonia og lækna frúan Helga Aho. Hetta var ein fjølbroytt l‡sing av tveimum sera ymiskum kvinnum, og Katarina hevur eina serliga útstráling á pallinum.

Og so ein leiklutur í einum filmi, nevniliga Ingvar Sigur›sson í leiklutinum sum Páll í filminum "Alheimsins einglar", sum var› s‡ndur í filmklubbanum í Nor›urlandahúsinum. Ingvar hevur nú fingi› ásko›aravir›isløna ina sum besti europeiski filmsleikari í ár. Sum sjónleikari er Ingvar sera nærverandi, og hóast Páll hevur stóra megi í tulking hansara, so vísir hann av einslistum ein vi›breknan persón.

Framførslan hjá Havnarkórinum í Gøtu kirkju av jólaoratorinum hjá Bach var gó›. Kóri› syngur sera væl vi› Jóni Stefánssyni sum lei›ara, og ta› var naka› heilt serstakt at hoyra hetta listaverk framført í so vøkrum umhvørvi.

Og so Summartónakonsertin í Listaskálanum vi› Blásarakvintet Reykjavíkur, har verki› Rapp hjá Atla Heimi Sveinssyni var› frumframført. Tá i› kunna› var› um hetta verki› í sambandi vi› at Bergen er menntanab‡ur ár 2000, var› dentur lagdur á, at frumframførslan hev›i veri› í Tórshavn. Eitt skemtiligt verk, sum tónleikararnir høvdu mikla fragd í at framføra. Henda spælig›e›i er naka›, i› mangan vantar tá i› tónleikur ver›ur framførdur.

Og at enda vil eg nevna framførsluna hjá Michael Wiehe og teimum føroysku tónleikarunum herfyri. Hugtakandi tónleikur vi› broddi í.

Helga

Helga Hjörvar, stjóri í Nor›urlandahúsinum

Í kirkju á Asoroyggjum



Høgni Djurhuus, útvarpsma›ur og útlagin kirkjugangari

Høgni Djurhuus

Hóast eg plagi at skriva "ateistur", tá eg svari spurnarbl›um ella skrivi í gestabøkur, fari eg altí› í kirkju, tá eg eri í ø›rum londum. Helst, tá eg eri í londum, har sum gudstænasturnar eru ikki so ke›iligar sum í okkara kirkjum. Har sum gle›i er í gle›ibo›skapinum. Har sum lívi› fyri dey›an eisini er til.

Í summar var eg á Asoroyggjunum. Og eg helt tann gó›a fer›asi›in. Fór í kirkju. Ikki bara, tá messa var. Men eisini fyri at seta meg eina løtu. Hvønn dag, vi›hvørt tvær fer›ir um dagin. Tí í kirkjunum á Asoroyggjunum, teimum sum eg var í, var allan dagin kirkjusangur úr hátalarum, fløga ella band, ta› veit eg ikki. Men júst so hart frá, at hann hoyrdist, uttan tó at órógva hini, sum vóru har í ø›rum ørindum.

Ta› var líka gott fyri sálina sum at sita á vertshúsi at fara inn í hesa dularfullu hálvask‡ming og ráligu luft, sum eru í aldargomlum, stórum rúmum, sum eingir ovnar eru í. Seti meg beint undir ein hátalara, lati aftur eyguni og lurti - lurti eftir hesum tølandi, dragandi sanginum. Hugvekjandi monotonur. Løtu seinni eri eg í mi›øldini. Durvi kanska og droymi. Ein fullkomin fri›ur mitt í b‡num vi› sínum bilum og motorsúkklum.

Tá eg komi aftur, og lati upp eyguni í august 2000, stendur hon har eitt sindur innari og bi›ur, haldi eg. Kolasvart sítt hár og kritahvítar, sera trongar buksur. Guds fullkomna skapanarverk. Ein eingil? Nei, hon hevur ongar veingir. Eg fari út, fram vi› gomlu, svørtu konuni, sum biddar á kirkjutrappuni, út í ná›ileysa sólarljósi›, á vertshús og bi›i um ein Absint, hendan eitra›a ljósagrøna løgin, sum Baudelaire og teir drukku, tá teir drukku seg í hel. Oyruni og eyguni full av undrinum í kirkjuni.

Mentan - ja, eitt slag.

Høgni

Besta mentanarupplivingin ár 2000:

Filmurin »Festen«

Turi› D. Hentze advokatur og forma›ur í Javnstø›isnevndini

Turi› Debes Hentze

"Festen" hjá Søren Vinterberg haldi eg man vera tann filmur sum best hevur fest seg. Eg sá hann í SvF fyrr í ár. Hesin filmur var fantastiskur. Drama fram um alt. Júst sum eg lena›i meg aftur í sofuni aftaná spennandi løtuna, tá sonurin undir bor›haldinum hev›i ákært pápan fyri si›amisbort, og veitslufólki› royndi at gloyma og skava útyvir vi› tosi um skjaldbøkusúpan og sós, var eg aftur tikin á bóli. Tí tá sonurin reisti seg a›ru fer›, var eg mentalt fyrireika› til, at nú fór sonurin at bera í bøtuflaka - og hann gjørdi júst ta› øvugta. Drama má sigast. Og sonurin reisti seg tri›ju fer›. Drama uttan líka á henda hátt at ver›a álopin, tá tú minst væntar ta› - vi› paradunum ni›ri. Og so vi› einum so vi›komandi evni sum si›amisbroti. Filmurin var eisini skemtiligur og samstundis álvarsamur og seg›i ikki so líti› um okkum menniskju, okkara lívslygnir og maskur og royndir at halda okkum flótandi omaná, summi hægri í vatninum enn onnur. Dramatisk realisma. Mær dámar best filmar sum minna um dagligdagin.

Turi›